gult24 cyan24 magenta24 svart24



## Vit nøkta tín tørv

tá vit tosa um reingering

Vit hava t.d.

- Fiburklútar
- Fiburmoppur
- Sápuúrdráttir
- Reingeringsvognar o.a.

DiverseyLever

Støkk inn á gólvið ella ring á tlf. 322676

Nú leygardagin 23.6
er opið kl. 10.00-14.00

Vit vera í summarfrí viku 27-28-29

A. H. Jensen
alt innan reingerð

Stoffalág 25 · tlf.: 322676 · fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo

Fiskimálastýrið

## Avloysarar

Í summarferiuni hava vit brúk fyri maskinmonnum, ið skulu vera avloysarar fyri okkara føstu maskinmenn og í hesum sambandi søkja vit eftir maskinavloysarum.

Til starvið krevst maskinútbúgving, heilsuprógv sambært læknakanning av sjómonnum.

Kavaraútbúgving er ein fyrimunur, tó eingin treyt.

Løn-, arbeiðs- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Maskinmeistarafelag.

Umsókn við prógvum og viðmælum skulu sendast til

**Fiskiveiðieftirlitið/-
Vaktar- og Bjargingartænastuna,**
Postboks 347
110 Tórshavn

í seinasta lagi fríggjadagin 29. juni 2001.

**Fiskiveiðieftirlitið/-
Vaktar- og Bjargingartænastan**

## Epileptikarafelag Føroya

Aðalfundur verður í MBF húsunum, Íslandsvegur 10 c, hósdagin 5. juli klokkan 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

Mentamálastýrið

## Lærarar
### at undirvísa deyvum- og/ella hoyribrekaðum

Í Sernámsdeplinum eru 2 størv leys at søkja: 1 lærarastarv og eitt starv fyri lærara í farloyvi. Hesir skulu undirvísa deyvum- og/ella hoyribrekaðum børnum frá 1. august 2001 – fyribils á Venjingarskúlanum og/ella í Sernámsdeplinum. Eftir umstøðunum mugu umsøkjarar eisini vilja átaka sær aðra undirvísing. Setanarstaðið er fyribils Sernámsdepilin, men í sambandi við møguliga skipanarbroyting, mugu umsøkjarar góðtaka, at setanarstaðið kann verða flutt.

Eftir tørvi skipar Sernámsdepilin fyri skeiðum, herímillum teknmálsskeiðum. Umsøkjarar skulu luttaka í hesum skeiðum, bæði sum næmingar og síðan sum undirvísarar.

**Førleikakrøv**
- Læraraútbúgving
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Fyrimun hava umsøkjarar, ið kunnu undirvísa í – og á teknmáli, meðan onnur áhugað kunnu eisini søkja størvini – íroknað lærarastudentar, ið fáa prógv í summar.

***Umsøkjarar, ið ikki hava teknmálskunnleika, skulu luttaka á umfatandi skeiðum longu frá skúlaársbyrjan.***

**Setanar- og lønartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Sernámsdepilin**
Á Frælsinum 32
Postrúm 2036
FO-165 Argir

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. juli 2001.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Eli Dahl í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

## Søkt verður eftir

einum pedagogi/hjálparfólki at byrja 20. august og einum hjálparfólki at byrja 03. september.

Størvini eru 25 tímar um vikuna.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera frítíðarskúlanum í hendi í seinasta lagi 16. juli.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðara á tlf. 372750.

**Frítíðarskúlin**
826 Trongisvágur

## Barsilsvikarur til Barnagarðin á Teiginum

Søkt verður eftir einum barsilsvikari 35 tímar um vikuna til vøggustovuna at byrja 6. august 2001 til 1. februar 2002. Søkir eingin pedagogur, verður hjálparfólk sett ístaðin.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, ið er normeraður til 20 barnagarðsbørn og 10 vøggustovubørn. Stovnurin læt upp 1. februar 2001.

Krøv til umsøkjarin:
- Hevur hug at seta dám á ein nýggjan stovn
- at tú ert fleksibul
- opin og erligur
- dugir at síggja møguleikar
- hevur góð samarbeiðsevnir

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Randi í Soylu Joensen, tlf. 361750 ella 212750.

Umsóknir saman við avrit av prógvi og møguligum viðmæli skal vera okkum í hendi seinast 14. juli og skal sendast til

**Sjálvsognarstovnurin
Barnagarðurin á Teiginum**
210 Sandi

O2

**Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur**
**Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77**

stephanssons hús

**ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG**
**HITA · MASSAGU · LINNA**
Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

## Sethús í Havn til sølu



Um hóskandi boð fæst selja vit sethúsini á Heygsmannavegi 9. Húsini eru í 2 hæddum og bygd í 1967. Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. · Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. · Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. · Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

gult25 cyan25 magenta25 svart25



all that rain
the naked truth




í sølubúðum kring landið

3orin Kr. 159,-

**Uppsetan og skipan av barrum**

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

ROTTANGAR




**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekniari
**BERGUR
Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## HEILSANIR



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum 19. juni, eisini ein heilsan til tín omma. Takk fyri at tit eru so góð við okkum øll.
**Ynskja øll abbabørnini**



Eg takki hjaraliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu mg og foreldur míni á konfirmatiónsdegnum 15. oktober.
**Maibritt T. Mørkøre, Hvalba**



**Góði langabbi**
Hjartaliga tillukku við degnum 19. juni, takk fyri alt tú ert fyri meg. Her sita vit báðir væl.
**Bestu heilsanir Tóki**



**Hey Olli**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Vit ivast viðhvørt um tað ikki er 3.
**Heilsan frá okkum sum eiga myndina**



**Hej!**
Betur seint enn ongantíð. Tillukku við degnum í mai.
**Ein beundrari úr Klaksvík**



**Góða Heidi**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum 21. juni.
**Vinkonurnar Edna og Lív**



**Góði Róland**
Okur ynskja ter hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Jesus pápin signi framtíð tína.
**Ynskja mamma og pappa**



**Góði Jógvan**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við prógvinum.
**Heilsan babba, Jórun, Tórhild og Róland**

**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:...........................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ..................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**